# Friðarligir sandoyingar

Tað hevur verið stak friðarligt á Sandoynni um vikuskiftið, nú bygdarstevna var í Húsavík. Av Politistøðini á Sandi verður sagt, at leygarkvøldið vóru nógv fólk í Húsavík. Nærum allir bilarnir, ið koyrdu úti vórðu kannaðir og har var onki at finnast at, skrivar heimasíðan bkv.fo. Høgni í Dali er virkandi sýslumaður í Sandoyar Sýslu.



# Eingin játtan til krígssavn í Vágum

- Vinnumálaráðið heldur uppskotið um eitt krígssavn vera spennandi, men má samstundis vísa á, at Landsverk í løtuni hevur virksemi í bygninginum. Tí er neyðugt at útvega Landsverki onnur høli, um bygningurin (myndin) skal nýtast til krígssavn, verður sagt í einum svari til Vága Kunningarstovu. Ætlanin var at gera hesi húsini til ferðavinnuna í Vágum, men í løtuni er eingin játtan á fíggjarlógini til tess, skrivar Vágaportalurin. Skotið verður upp, at Vága Kunningarstovan og Felagskommunan í Vágum kanna møguleikan at útvega Landsverki onnur hóskandi høli, og síðani setur seg í samband við Vinnumálaráðið.

# Verma seg við koli úr Hvalba í vetur

**Gongst sum ætlað, verður sett á eina nýggja kolaminu í Hvalba í heyst og so fæst aftur føroyskt kol at verma seg við í vetur. Men síðani Farmaleiðir vórðu einskildar, er flutningurin blivin øgiliga nógv dýrari**

KOLAGREVSTUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Nú verður síðsta hon løgd á fyrireikingarnar at gera eina nýggja kolaminu í Hvalba, sum eftir ætlan eisini skal verða eitt av teimum heilt stóru upplivilsunum hjá feðafólki í Suðuroy*

*Mynd: Jan Müller*

Gongst um ætlað, fáa vit aftur føroyskt kol at verma okkum við í vetur.

Tað hevur leingi ligið í luftini, at hvalbingar fóru at gevast at høgga kol undir Rókunum, tí har var so lítið kol eftir, at tað var meiri møði enn føði.

- Tað er bara av neyð, at vit høgga kol enn. Í minuni, sum vit nú eru í, er so lítið kol eftir, at tað mesta, vit høgga, er grót, so tað loysir seg yvirhøvur ikki longur, sigur Jan Poulsen, stjóri í Roynds Kolasølu.

Tí hava hvalbingar í fleiri ár arbeitt við at gera eina nýggja minu í Prestfjalli, har kanningar vísa, at munandi meiri kol er at fáa.

Fyrireikingarnar eru nú komnar so mikið áleiðis, at væntandi verður farið at høgga kol í nýggju minuni í heyst.

Kolagrevstur hevur fyrr verið í Prestfjalli og har hevur altíð verið góð drift, so teir hava góðar vónir til nýggju minuna, sum nú skal gerast har.

### Stórur eftirspurningur

Kolagrevstur er aldargomu vinna í Hvalba, men tað kastar so lítið av sær, at landið hevur stuðlað arbeiðnum við 530.000 krónur um árið.

- Men tað er ongantíð hækkað fyri at leggja upp fyri príshækkingum, so í veruleikanum er játtanin alsamt minkað.

Men nú nýggj mina skuldi gerast, hevur landið latið nakrar hundrað túsund krónur í eykastuðuli til grevsturin.

Sum støðan hevur verið nú, hava tey verri enn so klárað at nøktað eftirspurningin.

- Men tað, at tað er onki kol at fáa, frættist sjálvandi, so tað avmarkar seg sjálvt.

Hóast tey flestu nú hava miðstøðuhita, er tað framvegis ein ávísur eftirspurningur eftir koli.

- Hinvegin eru tað heldur ikki so fá hús, sum framvegis bara verða hitað við koli.

Sostatt ivast tey onga løtu í, at tað stórur eftirspurningur er eftir koli úr Hvalba, men tá ið fólk ikki fáa, tað, tey biðja um, fánar eftirspurningurin eisini, so í seinastuni hevur tað verið so sum so.

- Men høvdu vit havt meiri kol, høvdu vit kunna selt nógv meiri, staðfestir Jan Poulsen.

### Flutningurin nógv dýrari

Jan Poulsen staðfestir eisini, at eitt, sum hevur gjørt kolagrevsturin í Hvalba munandi tórførari, er, at Farmaleiðir vórðu einskildar.

- Tá ið Strandferðslan hevði Farmaleiðir, kostaði tað 15 krónur at senda ein sekk av koli til hvar tað skuldi vera í landinum.

- Nú kostar tað 300 krónur fyri hvønn platt. Er ein sekkur á plattinunum, kostar hann sostatt 300 krónur í farmagjaldi. Men eru fimm sekkir á plattinum, kosta teir 60 krónur í farmagjaldi og fimm sekkir er tað, vit hava sett sum minstamark, annars kann tað yvirhøvur ikki loysa seg.

Tað ger, at í dag kostar ein kolasekkur 150 krónur.

Teir royna ikki at lata alt ov stóran mun vera á at hita eini hús við koli og at hita tey við olju fyri ikki at eftirspurningurin skal verða alt ov stórur.

# Kol og ferðafólk hond í hond í Hvalba

**Ætlanin er, at nýggja kolaminan í Hvalba skal verða eitt ferðamál av teimum heilt stóru í Suðuroy í framtíðini**

KOL OG FERÐAVINNA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Kunnu tann aldargamli kolagrevsturin í Hvalba og tann alsamt veksandi ferðavinnan ganga hond í hond?

Tað er ein spurningur, sum hvalbingar nú ætla sær at finna útav.

Sum tað sæst í greinini omanfyri, er ætlanin at fara undir eina nýggja kolaminu í Prestfjalli í Hvalba í heyst.

Hesi seinastu árini hevur kolagrevstur ikki bara verið ein vinna í vanligum týdningi. Tað hevur eisini verið eitt nógv vitjað ferðamál í Suðuroy, har eitt alsamt veksandi tal av ferðafólki hevur fingið eitt stórt upplivilsi burtur úr at sleppa inn í eina kolaminu við staðkendum kolamonnum sum vegvísarum.

Og í teirri nýggju minuni í Prestfjalli, er ætlanin at veksa munandi um hesa hjávinnuna í kolinum.

Prestfjall er á vestursíðuni í Suðuroy og gongst sum ætlað, verður nýggja kolaminan sprongd tvørtur ígjøgnum fjalli, so at hon kemur út í bjørgunum á vestursíðuni í Suðuroy.

Har er stóra feitilendi Í Skorunum, sum hevur eitt sjáldsamt panorama útsýni yvir feitilendi, fuglabjørgini og vestur í Hav.

- Fáa vit sprongt ígjøgnum, ber til at fara heilt í bjørgini vestantil í Hvalba við ferðafólki og verður rætt fyriskipað, tað kann gerast ómetaliga spennandi hjá ferðafólki, heldur Jan Poulsen, stjóri í Roynds Kolasølu.

- Tað kann verða eitt gott íkast til kolavinnuna, leggur hann afturat.

Men so er tað eisini av praktiskum orsøkum, at ætlanin er at sprongja tvørtur ígjøgnum fjalli, tí tað hevði veitt nógva luft til minuna.

## Skopuningar frið fyri seyði

Nú er ætlanin at friða Skopun fyri seyði um veturin.

Gerhard Lognberg, borgarstjóri, sigur, at hetta er eitt mál, sum bygdaráðið hevur arbeitt við í nógv ár og nú eru tey komin á mál.

Tað verður longu í frá í vetur, at bygdin verður friðað fyri seyð.

Tað eru tveir hagar, sum hava mark ímóti bygdini og bygdaráðið hevur samráðst seg til eitt endurgjald til hagarnar fyri mist vetrarbit.

Tilsamans er hetta eitt átak, sum kosta kommununi 1,5 millión. Haraftrat hevur kommunan bundið seg til at halda stikið og tað er eitt stórt tak hjá Skopunar Kommunu, sigur borgarstjórin.

Endurgjaldið til hagarnar er 4,80 krónur fyri fermeturin fyri mist vetrarbit.